# Tórbjørn og Fogh í hólmgongu

**Eitt rættiligt kjak tók seg upp í Fólkatinginum millum Tórbjørn Jacobsen og Anders Fogh Rasmussen, tá ið forsætisráðharrin svaraði einum fyrispurningi frá føroyska fólkatingsmanninum um grundlógina.**

GRUNDLÓGARSTRÍÐ

*Magnus Dam*
*Keypmannahavn*




*Tórbjørn Jacobsen og Anders Fogh Rasmussen eru rúkandi ósamdir um støðuna hjá Føroyum í ríkinum. Hósdagin var verulig hólmgonga teirra millum í Fólkatingssalinum*

Tórbjørn Jacobsen og Anders Fogh Rasmussen komu ikki fram til eitt felags forstáilsi av ríkisrættarligu støðuni hjá Føroyum, tá teir trætaðust um millum annað grundlógina í Fólkatinginum hósdagin.

Tórbjørn Jacobsen mótmælti sum tjóðveldismaður, at føroyingar nakrantíð hava lagt seg undir grundlógina, meðan Anders Fogh Rasmussen helt, at Tórbjørn Jacobsen royndi at tekna ræðumyndir á veggin av einari danskari stjórn, sum undir ongum umstøðum vil loyva føroyingum at fara út úr ríkinum. Soleiðis er veruleikin ikki, segði hann.

Orsøkin til hólmgonguna teirra millum var ein fyrispurningur, sum Tórbjørn Jacobsen hevði sett forsætisráðharranum um grundlógina.

Forsætisráðharrin segði á vitjan síni í Føroyum, at um Føroyar skulu loysa frá Danmark, so krevur grundlógin, at Fólkatingið gevur sítt samtykki. Tá ið hetta er eitt krav, so má tað samstundis innibera, at føroyingar hava samtykt grundlógina sum sína egnu, heldur Tórbjørn Jacobsen. Tí vildi hann hava Anders Fogh Rasmussen at siga sær, nær hetta er hent.

### Samtykt fleiri ferðir

Í svarinum vísti Anders Fogh Rasmussen á, at kongur "gav" fólkinum grundlógina í 1849, og tí er upprunaliga grundlógin ongantíð samtykt av fólkinum. Hinvegin eru broytingar í grundlógini samtyktar á fólkaatkvøðum fleiri ferðir - í 1920, 1939 og í 1953 - bæði í Føroyum og Danmark. Og av tí at § 19 í grundlógini ásetur, at Fólkatingið og stjórnin skulu geva sítt samtykki, um Føroyar skulu úr ríkinum, so er tað so, staðfesti forsætisráðharrin.

Men svarið nøktaði als ikki Tórbjørn Jacobsen, sum ikki kundi góðtaka tulkingina hjá forsætisráðharranum.

- Um danir framvegis halda, at føroyska fólkið er undirlagt donsku grundlógina, so kenni eg meg sum umboð fyri Tjóðveldisflokkin noyddan at mótmæla og vísa á, at løgtingið so seint sum í fjør samtykti, at føroyska fólkið hevur varðveitt sjálvsavgerðarrættin sambært fólkarættinum og ST-viðtøkum, segði hann.

Fólkatingsmaðurin vísti enn einaferð á, at føroyingar ikki samtyktu grundlógina í 1849, og harumframt vísti hann á, at ein meiriluti var fyri loysing í 1946. Men hesa avgerðina virdu danir ikki. Tórbjørn Jacobsen vísti eisini á, at tað bert høvdu verið 7,6 prosent á vali, tá ið grundlógin varð broytt í 1953, so tað kundi ikki brúkast til nógv, helt hann.

### Hoyrir heima í Føroyum

Anders Fogh Rasmussen hevði eitt sindur ilt við at síggja trupulleikan, sum Tórbjørn Jacobsen royndi at vísa á.

Forsætisráðharrin vísti á yvirlýsingina sum hann og løgmaður gjørdu í Føroyum í januar. Har verður kósin stungin út í kortið.

- Sum eg havi skilt var breið semja í Føroyum um yvirlýsingina - eisini í Tjóðveldisflokkinum, segði Anders Fogh Rasmussen

Til hetta segði Tórbjørn Jacobsen, at spurningurin er, um ein møgulig fólkaatkvøða um loysing verður vird sum ein fólkarættarlig atkvøðugreiðsla - sum ikki krevur samtykki úr Danmark - ella sum ein statsrættarlig atkvøðugreiðsla, har danir skulu geva sítt samtykki til úrslitið.

Men Tórbjørn Jacobsen fekk ikki forsætisráðharran til at geva seg.

Anders Fogh Rasmussen helt, at Tórbjørn Jacobsen roynir at draga eitt kjak inn í danska Fólkatingið sum av røttum hoyrir heima í Føroyum.

- Tað er ikki stjórnin ella Fólkatingið, sum forðar fyri, at heimastýrisskipanin verður endurskoðað ella at Føroyar fáa sjálvstýri, segði forsætisráðharrin, sum at enda bað Tórbjørn Jacobsen føra sítt kríggj í Føroyum heldur enn í danska Fólkatinginum.

At fólkatingsmaðurin ikki tekur hesa síðstu áheitanina til eftirtektar er tó púra greitt, tí hann hevur longu sett danska løgmálaráðharranum ein nýggjan fyrispurning um ríkisfelagsskapin. Tað kjakið er sett á dagsskránna fyri fundin næsta mikudag.

# Stovnan av tónleikafelagi í Norðoyggjum

TÓNLEIKAFELAG

Seinasta vikuskiftið vóru umboð fyri tónleikasamtakið Grót og F.U.T. orðuri í Klaksvík, og skipaðu saman við klaksvíkingum fyri almennum fundi viðv. møguligari stovnan av einum tónleikafelagi, ið, eins og Grót í eysturoynni, skal arbeiða fyri at menna tónleikalívið í norðoyggjum. Tað skal verða við m.a. at fyriskipa konsertir og tónleikatiltøk, og betra um og fáa skipaðar venjingarumstøður hjá tónleikarum í Klaksvíkini.

Settur varð ein arbeiðsbólkur at fyrireika stovnanina av felagnum í Klaksvík, so sum at gera uppskot til endamálsgrein, viðtøkur fyri felagið, navn, logo og annað.

Fríggjakvøldið 22. februar kl. 20.00, verður so fundur í býráðshøllini í Klaksvík, har ætlanin er at felagið skal verða sett á stovn.

Fyrireikarirnir vænta sær nógv burturúr hesum felagi. Fyrst og fremst eitt meira virkið tónleikaumhvørvi í Klaksvík. Tað merkir m.a. fleiri tiltøk, konsertir o.a. Betri umstøður til teir hópatals tónleikararnar í Klaksvík, sum tørva skipaðar venjingar umstøður og ein pall at framføra á. Vónin er at bæði býráð og vinnulív eins væl og landsmynduleikar við hesum felag kunnu hava ein mótpart, samsvarvsfelaga og ráðgeva, tá um tónleikaviðurskifti ræður.

Ætlaninir eru eisini um at stovna líknandi felag í Havn í næstum. Hesi trý feløg, Grót í Eysturoy, felagið í Klaksvík og í Havn kunnu síðan samstarva um ymisk viðurskifti. T.d. senda bólkar úr einum øki í eitt annað, skipa fyri skeiðvirksemi saman osfr. Og annars hava nakrar virknar tónleikapallar í økjunum. Harafturat er ætlanin at fáa eitt yvirskipað samstarv í lag ímillum feløgini, her hevur m.a. verið tosað um at FUT kundi havt leiklutin sum eitt slag av einum landsfelag, men her er ikki endalig støða tikin enn.

Stigtakararnir vóna at síggja allar tónleikaáhugaðar Klaksvíkingar á fundinum fríggjakvøldið - yrkistónleikarar eins væl og leikmenn, áhoyrar og konsertgangarar, ungan sum gamlan og høgan sum lágan, stutt sagt øll, ið vilja tónleikalívinum í Klaksvík at frama, eru vælkomin fríggjakvøldið 22. februar kl. 20.00 í býráðshøllini í Klaksvík.

# hygg & hoyr



Frá fríggjadegi 22. februar til hósdagin 28. februar

## Tilvera: Um deyðssyndirnar



*Í miðøldini varð tosað um, at vreiði og øvund, gírni og oyðsl vóru deyðssyndir. Í dag eru hesi fyribrigdi nærum psykologiserað. Tilvera um deyðssyndir hósdagin kl. 19.00. Armgarð Arge leggur til rættis.*

## Tak frá honum, ið einki hevur!!!

*Bergur Rasmussen ummælir:*



Mangan verða miðlarnir havdir á lofti, men ymiskt er, hvussu umdømið er.

So helst mundi tað koma væl við hjá mongum nú Føroya Tele, sambært Degi og Viku týskvøldið, ætlar at yvirtaka ta tænastu, býráðið í Havn hevur veitt borgarum sínum, líka síðan borgarstjórin æt Michelsen til eftirnavn. – Nevniliga at vera ein fullkomiliga ókritiskur endurgevari av amerikonskum mainstream serium, tápuligum fordummandi eydnuhjólum, hálvvánaligum filmum, donskum fótbóltsdystum og soft-core porno, alt samalt kryddrað við endaleysum blæu-, sjampoo-, smyrsl-, tampax- og bil-lýsingum.

Men hvussu fáa vit vanligu fólk so lut í allari hesari skíggjasælu? Jú, vit skulu bert keypa eina serliga antennu, dekodara og tekna okkum fyri enn eitt hald av onkrum slag (hjá Føroya Tele?). – Halló, plaga tannáringar at rópa, segði nakar logikkur???

Vit hava, sum er, tvær Public Service støðir, ið skulu klára at liva upp til ta marglæti av hópframleiddum bíligum undirhaldi, sum annars stendur okkum í boði. Og vit krevja av teimum, at støðirnar skulu vera bæði áhugaverdar og viðkomandi, samstundis, sum vit grenja um brúkaragjaldið, og landsins kosnu ikki vilja veita miðlunum eina krónu. Tað er heldur hinvegin, at fleiri av okkara politikarum vilja taka frá teimum tað sindrið, tey hava, og lata teimum privatu veitarunum burturav, tí Rás 2 og Lindin, ið ongar skyldur hava um eitt ávíst minsta mark av dygd og innihaldi hava eisini brúk fyri pengum.

Álvara tos! Hatta líkist argumentasjónini summi hava fyri fírskúlum! Fólkaskúlin er sovnaður, og tí skal ein partur av teimum pengum, sum játtaðir verða til skúlan skerjast og nýtast til fírskúlarnar í staðin. – Tá verður skúlin fyri øll neyvan betri av!

Mín spurningur er: Nær skilja føroyingar, at teir liva í einum sera lítlum landi, har pengarnir til líkt og ólíkt ikki eru teir somu sum í útlondunum?

Annars eri eg keddur um, at dansitíðin er av á hesum sinni, tí hasir ungdómarnir úr Runavíkini vóru óførir, og tá ið sumbingar við sínum bleytu g'um og lætta stevi taldu niður (ella upp) saman við bæði Sankta Simeon og Sankta Mortan, dámdi mær væl. Eitt sum mær hinvegin ikki dámar væl er sendingin Í Víngarðinum! Havi altíð hildið, at makan til sjálvglaða konservativa nalvaskoðan skal man leita leingi eftir, so eg koyri vanligvís eina fløgu á, tá ið Carlsen maðurin spælir sukursøtan gospell tónleik. Men hesu ferð flutti eg fyri einaferð skyld yvir á Rás 2. – Og tað var heilt fantastiskt! – Ungdómarnir í Klaksvíkini, sum leingi hava ynskt sær eitt gement diskotek, vóru millum evnini, Norðlýsisredaktiónin hevði á skránni hendan tíman. Og eitt, tvey, trý, so høvdu teir loyst dansitrupulleikan hjá tannáringunum í Klaksvík. Býráðið skuldi bara syrgja fyri, at teir, sum ætla at tjena góðar pengar upp á náttartrongdina hjá ungdóminum skuldu fáa høli fyri lítið og lætt, så var denn skid slået! Og so fingu tey, sum vilja hava fleiri barnagarðar í Havnini, eisini eitt skot fyri bógvin í sama andadrátti. – Og hatta er júst tað, eg meini við, tá ið eg meti tað skeivt, at taka pengarnar frá almennu miðlunum og býta teir út til hvønn Hanus og Janus, bara hann arbeiðir fyri seg sjálvan!

Til nakað heilt annað! – Marius var stuttligari enn nakrantíð, tá ið Børson junior var bankastjóri. Hasi dinge-linge-linge-linge-ling'ini vóru kostiligt skemt. Og eg helt tað vera ólukksáliga ergiligt, at ungu hvalbingarnir ikki kendu Chris de Burgh, tí sum Suni Merkistein segði: Tit hava so gott sikti har suðuri. – Og tá er spell at fella upp á Lady In Red.

Gott sikti má man annars siga, at tvørádámurnar høvdu í fjórða og avgerandi settinum í flogbóltssteypafinaluni leygardagin. – Man veit aldrin, hvar man hevur okum, segði Svanna, tá ið gullmedaljan hekk um hálsin á henni. Tað er í hvussu er langt síðan, at eg havi følt slíkan spenning í sambandi við ein flogbóltsdyst.

Eitt tað besta hesa vikuna var annars mentasendingin Magn við kríggi, maktgyrnd og blóði í felagsnorðurlendsku uppsetingini av Shakespeare leikinum Macbeth. – Cezaris, leikstjórin úr Litava var ikki í iva. Talan var um »actors of world level« og »language of blood«, tá ið hann skuldi seta orð á avrikið hjá norðmonnum, svium, føroyingum og finnum.

Tað gekk nakað róligari fyri seg í frekt samanklipta brotinum um, tá ið Teitur og Niklas og Lena spældu unplugged. – Meir av hasum SvF!

At enda nøkur rósandi orð til lobransmannin John Johannesen, ið av álvara tykist vera »sprungin út« sum okkara maður í Suðri. Tú ert óførur! Tórdagin hevði tú innsløg um TB-dámurnar og vónirnar fyri gullmerkjunum. Og bang! so vunnu tær! Umframt tað, so vitjaði tú seinasta opna kolanámið undir rókunum í Hvalba. Og bang! so fingu teir játtilsi um at lata nýtt nám upp undir Prestfjalli. Og so var besta sitatið í miðlunum hesa vikuna eisini í einum innslagi hjá tær. Tað kom, tá ið tú tosaði við mannin á keiini í Vági. – So tað loysir seg at vera útróðrarmaður í dag? – Viss man fær fisk!

Hetta ljóðar sum ironi, tað viðgangi eg, men eg meini tað! Hví fáa suðringar sær ikki eitt studio, so teir eisini kunnu framleiða sendingar fyri Útvarpið? Lokálu sendingarnar úr Klaksvíkini høvdu verið færri, men avgjørt av javnt góðari dygd, og Johnsigurð Johannesen hevði ikki kent seg noyddan at skula forklára, hvat orðið sentnari merkir, bara tí man hevur prátað við ein vágbing í Degi og Viku!

## Riddararnir úr Tir Na Nog




## Trý korter við Martin Ejdesgaard




## Blue Thunder




## Alle elsker Raymond

